# Aldubáran við nýggjum tónleiki eftir Páll Sólstein

**Páll Sólstein er ein dugnaligur og seriøsur tónleikari. Hetta hevur hann ofta víst í ymiskum tónleikahøpi. Seinasta vikuskifti vísti hann sítt serliga kynstur at skriva løg og ikki minni hegni at útseta løgini**

KONSERT

*Orð og myndir: Dávur Winther*



*Páll Sólstein hevur latið føroyskan skaldskap í nýggjan tignarliga tónleikabúna*

Páll Sólstein hevur ofta verið í Føroyum og spælt í ymiskum tónleikahøpi, kanska flestu ferðir í Føroya Symfoniorkestri. Hann er útbúgvin valdhornspælari og hevur sín gerandisdag á Kongaliga Kapellinum sum hornspælari.

## Allar tangentarnar

Løgini og útsetingarnar vístu, at Páll hevur hollan tónleikaligan kunnleika, við støði í tí klassinska. Tó lat hann ikki heilt sína fortíð liggja, sum gamal rokktónleikari í ymiskum orkestrum í Klaksvík, sum ungur. Hetta kom til sjóndar í fleiri løgum, har Páll hevði valt at hava ein rútmiskan bass undir, og slapp Arna Ludvík sera væl frá sínum bass leikluti.

Við í tónleikinum var eisini ein feril av jazz og nýmótans sniði. So Páll Sólstein vísti við sínum nýggja tónleiki, at hann kann spæla uppá "allar tangentarnar." Annars gevur hesin samansetningur av instrumentum eina sera fjølbroytta ljóðmynd, soleiðis at tú sum áhoyrari ongantíð keddi teg. Men heldur nutu oyruni margfeldni í tónleikinum.

Sangarnir Karl Martin Samuelsen og Anna Maria Olsen vóru ein spennandi greipa, sum stuðlaðu væl hvønnan annan — men vístu sanniliga sín førleika einsæris eisini. Tey megnaði væl at lúka teimum krøvum, sum verða sett til klassiskar sangarar.

## Symfoniskt og heilskapað

Tónleikabúnin við tí serligu útsetingini, gav hvørjum ljóðføri sær møguleika at vísa og royna seg. Tó legði eitt heilskapað og symfoniskt samspæl framførsluna á eitt serligt støði.

Páll Sólstein hevur víst hvør hann er — Tað er stuttligt, at ein so væl útbúgvin maður, sum hevur ein so krevjandi dag, eisini tekur sær stundir til at lata føroyskan skaldskap í ein so serstakan og tignarligan búnað og lata okkum fáa lut í hesum. Konsertir vóru í Atlantis fríggjakvøldið og í Læraraskúlahøllini sunnukvøldið.

Konsertin fríggjakvøldið var ein serlig uppliving av teimum fáu og mentanarhúsið Atlantis var ílatið í serstakan og hugnaligan búnað til høvið.

**Løgini vóru gjørd til hesar yrkingar:**

Rennur áin morgunglað - *eftir Christian Matras*
Mei mynd
Barnsligt minni
Reikar tú úti um kavalond

Í mei er so stuttligt - *eftir Tummas N. Djurhuus*
Kvøld - *eftir H. A. Djurhuus*
Lív - *eftir Steintór Rasmussen*

Hoyrdu tit havsins andalag - *eftir William Heinesen — Týðing Chr. Matras*
Veðurhvíld á vetri
Træið

## Hesaferð spældu í Aldubáruni:

Ólavur Olsen - trompet
Andras olsen - trombone
Sámal Peteren — violin
Jógvan Zachariasen — fagot
Ólavur Jacobsen — guitar
Andrea Heindriksdóttir — floytu
Arna Ludvík — bass
Stamen Stantchev - klaver
Karl Martin Samuelsen og Anna Maria Olsen - sang
Páll Sólstein — horn og klaver



*Symfoniska samspælið legði framførsluna fríggjakvøldið á eitt serligt støði*




AMIN JENSEN
BLÆSER PÅ DK
KAPPING






**Vinn atgongumerkir**

Kundi tú ikki hugsað tær at farið ein túr til Fuglafjarðar leygarkvøldið at uppliva kenda danska skemtaran Amin Jensen á palli. Stórur áhugi er fyri at ogna sær atgongumerki til framførsluna hjá stóra dananum. Sosialurin hevur tó tryggjað sær nøkur atgongumerkir, og hesi hava tit lesarar møguleika at ogna tykkum.

Tað einasta, ið tit skulu gera, er at svara niðanfyri standandi spurningi rætt og senda okkum svarið, so at tað er okkum í hendi í seinasta lagi fríggjamorgunin klokkan átta.
Vinnararnir av atgongumerkjunum verða kunngjørdir í vikuskiftisblaðnum.

**Hvørja útbúgving hevur Amin Jensen?**
☐ Vøddamýkjari ☐ Plátusmiðður

Navn:
Bústaður:
Tel:
Teldupostur:

Sendið svarseðilin til: Sosialurin · Postsmoga 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Amin Jensen kapping"